# Broytingar í Kunningardeild Ferðaráðsins

Aldan, ið er navnið á Kunningardeild Ferðaráðsins hevur síðan 1991 veitt ferðafólki persónliga kunning javnbjóðis við aðrar kunningarstovur í landinum.

Tá Aldan í sínari tíð bleiv sett á stovn vóru umframt hesa bert tvær aðrar kunningarstovur í landinum nevniliga Kunningarstovan í Tórshavn og Kunningardiskurin á flogvøllinum.

Síðani eru fleiri kunningarstovur komnar kring landið, og ein onnur er ávegis.

Harvið er leikluturin hjá Alduni blivin minni týðandi og talið av vitjandi ferðafólki í Alduni niðri í Vágsbotni er fallið munandi seinasta árið, meðan Kunningarstovurnar runt landið hava havt eina munandi framgongd. Talið á útlendskum vitjandi í Alduni var í 2003 uml. 8.000 ferðafólk men fall í 2004 niður í 4.400.

Kunningarstovurnar runt landið eru Norðoya Kunningarstova í Klaksvík, Kunningarstovan í Runavík, Kunningarstovan í Fuglafirði, Kunningarstovan í Tórshavn, Kunningardiskurin á Flogvøllinum, Sandoyar Kunningarstova, Kunningarstovan á Tvøroyri og Kunningarstovan í Vági. Umframt hesar verður eitt nýtt kunningarstað í Vestmanna latið upp um fáar vikur nevniliga Vestmanna Tourist Centre.

Umframt hettar fáa ferðafólk ávegis til Føroya eisini kunning umborð á Norrönu, og lutvíst eisini í móttøkunum á gistingarhúsum kring landið.

Samstundis við, at frambrotini innan samskifti og kunningartøkni hava mennt seg munandi seinnru árini, verður alt meira orka nýtt til at kunnað elektroniskt. Við hesum nýggja tiltakinum, vil Kunningartænasta Ferðaráðsins royna at leggja størri dent á, elektroniska (KT) kunning, um heimasíðu www.tourist.fo portal www.visit-faroeislands.com og www.kunning.fo

Har afturat fara starvsfólk úr Kunningartænastu Ferðaráðsins við jøvnum millumbili, at vitjað á Kunningarstøðum og í gistingarhúsmóttøkum kring landið, umframt, at samstarva verður neyvari við kunningina umborð á Norrönu um kunning av ferðafólki ávegis til Føroya og umborð á Strandfaraskipum Landsins.

Við hesum vónar Ferðaráðið at verða viðvirkandi til, at dagførd vitan og faldarar um øll ferðavinnuøkir í Føroyar er til taks á øllum kunningarstøðum og at fólk sum takast við hettar virksemið altíð hava eina breiða og dagførda vitan um landið.

# Stella stuðlar 20 børnum á Sri Lanka

Í blaðnum fyrradagin hevði Stella Zachariassen eina áhugaverda frágreiðing frá ferð síni í Sri Lanka í farna mánaði.

Eitt av málunum var at finna fram til, hvat hjálpararbeiði føroyingar kunnu vera við í.

- Vit stuðla 20 børnum sum eru rakt av flóðalduni við 100 US$ um mánaðin fyri hvørt barnið. Íalt verður tað so um2000 US$ um mánaðin.

– Hesir pengar eru longu innkomnir og verða sendir hvønn mánað til at stuðla børnunum. Við hesum pengum verður goldið fyri skúla, klæðir, mat, læknaviðgerð, heilivág og annað, sigur Stella Zachariassen.

S amstundis vísir hon á, at teir deyðu kropparnir, sum vóru svartir, var ikki nakað sum tey sóu, tí hetta var jú 2 mánaðir aftaná hendingina. Hetta var tað fólk søgdu teimum, og sum tey hava sæð í myndum ymsastaðni frá.

## Ársaðalfundur

**Boðað verður við hesum til ársaðalfundar í P/F Føroya Banka**

**hósdagin 31. mars 2005 kl. 17 .00**

á Hotel Føroyum, Tórshavn, við hesi dagsskrá:

1. Frágreiðing nevndarinnar um virksemi bankans í farna ári.
2. Framløga av ársroknskapi við grannskoðaraátekning til góðkenningar og ársfrágreiðing.
3. Avgerð um nýtslu av avlopi sambært góðkenda ársroknskapin.
4. Val av nevndarlimum.
5. Val av grannskoðarum.
6. Uppskot frá nevndini:

   *Nevndin mælir til, at hon fær heimild til innan endan av mars 2006 at lata bankan ognast upp til 1 pst. av partapeningi bankans fyri ein kurs, sum ikki kann víkja frá seinasta almannakunngjørda innara virðinum við meira enn 10 pst.*

7. Ymiskt.

Grannskoðaði ársroknskapurin og ársfrágreiðingin liggja frammi á skrivstovu bankans í Húsagøtu 3 í Tórshavn.

Atgongumerki til aðalfundin verða útflýggjað á deildum bankans í seinasta lagi mikudagin tann 23. mars 2005.

Tórshavn, tann 18. februar 2005.

NEVNDIN

FØROYA BANKI



## Stuðul og tryggleiki til ferðina gjøgnum lívið

Í Føroya Banka hevur tú góðar møguleikar at tryggja teg og familju tína. Her fært tú alt á einum stað - fíggjarráðgeving og tryggleika.

Saman kunnu Føroya Banki og Trygd bjóða allar hóskandi tryggingar til ferðina gjøgnum lívið: Familjutrygging, Sethúsatrygging, Biltrygging, Lán við trygging og Samlagstrygging.

Kom inn í eina av deildunum hjá Føroya Banka ella til Trygd og fá eina trygging, sum hóskar til tín tørv.

TRYGD

FØROYA BANKI